## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hann veksur vindin upp í skrið av landsynningi og suðri, móti náttini av útsynningi og vestri. Skýggjað og regn meginpartin av tíðini. Hitin millum 5 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Upp í skrið av útsynningi og vestri, eitt skifti nakað minkandi og móti kvøldi av útnyrðingi. Hitin millum 2 og 5 stig. Mest skýggjað, regn ella ælaveður. Hitin millum 5 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Upp í hvassan vind av norði, út á dagin minkandi til gul til stívt andøvsgul av vestri. At byrjka við ælaeður, men út á dagin slítur helst í. Hitin millum 3 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi. Skýggjað og í skiftum regn. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Útvarpsmenn í Suðuroy

GÓÐAN MORGUN FØROYAR

*Áki Bertholdsen*

*aki@sosialurin.fo*

Í gjár og í dag hevur Útvarpið tikið tað forkunnuga stig at koma til Suðuroy at at senda »Góðan Morgun Føroyar«".

Í gjár kom ein sending upp á tveir og ein hálvan tíma burturúr, har útvarpsmenninir koma víða um í Suðuroynni. Teir prátaðu bæði um vatn í Lopra og motorsúkklur á Tvøroyri og innímillum fingu teir eisini stundir til eitt drúgvt prát um kommunusamanlegging í Suðuroynni. Hetta málið er nógv viðgjørt í Suðuroy seinastu tíðina og tað seinasta er, at í sambandi við eitt lýsingagblað, hevur Lions Klubburin í Suðuroy gjørt eina veljarakanning um, hvat suðuroyingar halda um kommunusamanlegging.

Kanningin er gjørd í samstarvið við økisgranskingardepilin og miðnámsskúlan og hon vísir, at næstan 74% av suðuroyingum vilja leggja kommunur saman.

Í dag verður hildið fram og í morgun fer Útvarpið at senda frá klokkan 7.35 til klokkan 8 og frá klokkan 8.05 til klokkan 9.

Í sendingini í dag fara tey at eisini at ferðast víða, heilt úr Sandvík, har tey tosa um gomlu bóndahúsini uttan Ánna, sum Fornminnissavnið hevur í varðveitslu og tey tosa eisini við borgarstjóran í Fámjin um kommunusamanlegging og ymiskt annað forvitnisligt. Í dag fara tey eisini til Vágs at tosa um Lemmavirkið og á Tvøroyri at tosa um nýggju landingarmiðstøðina. Men harumframt er eisini ymiskt annað á skránni.

Elis Poulsen, sum er ein av útvarpsmonnmum, sigur, at teir hava verið avbera væl fyri.

– Vit eru sera væl móttiknir og blíðskapurin er óførur. Tað er meiri enn so fyri, at fólk hava vinka okkum inn av gøtuni at fáa ein kaffimunn, sigur Elis Poulsen



*Her stendur Øssur Egholm og prátar við Onnu Kirsten Steinø, sum prátaði um gomlu handilshúsini hjá Thomsen, sum tey hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at varðveita*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 1 |
| Tromsø | – |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | – |
| Moskva | – |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 12 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 6 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst eystan fyri Jan Mayen fer spakuliga í ein landnyrðing.



Sunudagin rekur køld luft við ælaveðri inn yvir oyggjarnar, men í næstu viku koma brúgvaløg við regni frá einum lágtrýsti sunnan fyri Grønlandi inn yvir Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/12 kl. 06⁰⁰– 11/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,4°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,2 mm – mált frá 10/11 kl. 06⁰⁰–11/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 14,4 mm


fk

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

7. desember: Mánin longst frá jørðini
8. desember: Fullmáni
16. desember: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 12. des | 09.03 | 21.26 | 08.03 | 20.26 | 08.18 | 20.41 | 11.03 | 23.26 | — | 12.03 | 07.18 | 19.41 | 06.18 | 18.41 | 09.18 | 21.41 | 10.18 | 22.41 | 08.48 | 21.11 | 10.03 | 22.26 |
| 13. des | 09.49 | 22.12 | 08.49 | 21.12 | 09.04 | 21.27 | 11.49 | — | 00.26 | 12.49 | 08.04 | 20.27 | 07.04 | 19.27 | 10.04 | 22.27 | 11.04 | 23.27 | 09.34 | 21.57 | 10.49 | 23.12 |
| 14. des | 10.35 | 22.54 | 09.35 | 21.54 | 09.50 | 22.09 | 00.12 | 12.35 | 01.12 | 13.35 | 08.50 | 21.09 | 07.50 | 20.09 | 10.50 | 23.09 | 11.50 | — | 10.20 | 22.39 | 11.35 | 23.54 |
| 15. des | 11.14 | 23.48 | 10.14 | 22.48 | 10.29 | 23.03 | 00.54 | 13.14 | 01.54 | 14.14 | 09.29 | 22.03 | 08.29 | 21.03 | 11.29 | — | 00.09 | 12.29 | 10.59 | 23.33 | — | 12.14 |

5 707265 100043 >